# Fyrireiking í sertifisering

**Tann 18. mai 2009 bjóða vit øllum áhugaðum skeið í at fyrireika seg til próvtøku í IPMA sertifisering á D, C og B støði.**

Tiltakið verður mánadagin tann 18. mai 2009 kl. 9.00 – 16.00 á Hotel Føroyum.

**Í framløguni veður dentur lagdur á**
- at planleggja verkætlanarleiðslu og framferðarhættir
- at stýra málum, góðsku, tíðarætlan og búskapi
- at stýra váða, leiðslu, avtalum og sáttmálum
- treytir og dissiplin
- samskifti og bygnað
- portefølje



Fyrilestrarhaldari er Steen Vierø Petersen. Hann er útbúgvin búskaparfrøðingur, PMI-sertifiseraður verkætlanarleiðari og hevur í dag egna fyritøku. Hann er nevndarlimur í stýrinum í Dansk Projektledelse og er ein av høvundunum til NBC (National Competence Baseline), ið verður nýtt til sertifiseringar í Noregi, Svøríki og Danmark.

Steen fer eisini á skeiðnum ítøkiliga at gjøgnumganga sjálvsmetingina, sum er kravd í sambandi við IPMA-sertifisering.

Tað stendur skeiðluttakarum í boði at fáa sína egnu sjálvsmeting gjøgnumgingna og soleiðis at fáa virðismikið feedback til tess at betra um góðskuna av sjálvsmetingini. Fyri at skeiðluttakarar skulu kunna gera sær dælt av hesum einastandandi møguleika, má Steen fáa sjálvsmetingina í seinasta lagi 13. mai.

Mælt verður øllum, sum umhugsa at lata seg sertifisera, antin nú í juni ella í desember, um at arbeiða við og fylla inn sjálvsmetingina, senda hana til steenvieroepetersen@gmail.com og luttaka í skeiðnum tann 18. mai.

Fílan, sum nýtt verður at fylla út sjálvsmetingina í, kann fáast við at venda sær til skrivaran hjá FVL, Annu Katrinu Olsen á anol@postverk.fo ella 212138.

Tilmelding fer fram við at gjalda luttøkugjaldið á kontu felagsins, sum er 9181 1484534. Luttøkugjaldið er 1.000 kr. fyri limir og 1.500 kr. fyri ikki limir.

Málbólkur. Seminarið er ætlað bæði almennu umsitingini og vinnulívinum og vendir sær serliga til fólk, ið ætla sær altjóða sertifisering eftir IPMA, og annars øllum, ið hava áhuga at menna sín førleika innan verkætlanarleiðslu.

**Øll eru vælkomin.**

Føroysk Verkætlanarleiðsla
Partur av Dansk Projektledelse

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo

---

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

## Vilt tú reka kantinuna á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði?

Føroya Studentaskúli og HF-skeið søkir eftir vinnurekandi persóni ella felag, ið vil átaka sær at reka kantinu skúlans.

Vit ynskja okkum eina góða og støðuga tænastu til tey umleið tey umleið 750 starvsfólkini og næmingarnar, ið hava sína dagligu gongd á skúlanum, og eitt fjølbroytt, dygdargott og sunt útboð av mati til ein prís, ið næmingar okkara megna at gjalda.

Afturfyri bjóða vit lagaligar leigutreytir fyri eina góða kantinu við tilhoyrandi køki, útgerð og goymslum.

Er hetta ein avbjóðing, ið tú hevur hug at átaka tær, so fær inn á heimasíðu skúlans www.hoydalar.fo og fá fleiri upplýsingar og kunning um treytir.

Tilboð upp á kantinuraksturin skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. mai.

---

# TÆNARI

## TIL RESTAURANT ZITOUNA

Vit sóknast eftir tænari & kokki til fast starv & summarstarv.

**Tað krevst, at umsøkjarar:**
- eru fyrikomandi
- eru álitandi
- hava góð samstarvsevni
- eru tænastuáhugaðir

Umsóknarfreistin er 1. juni 2009

**Umsóknir skulu sendast til:**
Restaurant Zitouna
Lucas debesargøta 3
100 Tórshavn

ella á teldupost

zitouna@flatrate.fo

Meira fæst at vita á 56 22 23

**SP/F RESTAURANT ZITOUNA**
**TEL 602220 -562222**

---



## Triumph Daytona 675 Sport

**Árg:** 08/2006 **Litur:** Reytt
**Km:** 1.100 **Motor:** 675cc / 128hk

**Prísur. Kr. 90.000,-**
**Tlf.: 21 57 57**

---

# LÆRARASTARV

## í Kvívíkar skúla

**Tíðaravmarkaði størv skúlaárið 2009/2010 í Kvívíkar skúla.**

**Søkt verður eftir:**
- Einum lærara til uml. fulla tíð og einum til uml.13 tímar. Størvini eru vegna niðursetta tíð, avlopstímar og tímar til serligan tørv. Endaliga tímatalið verður ásett í september.

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir
- vilja vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær:**
- ítrótt
- handverk og list (evning og tónleik)
- Flokslærarauppgávu

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving og helst royndir viðvíkjandi næmingum við serligum tørvi. Tó kunnu fólk við royndum og/ella áhuga fyri ped. mennandi arbeiði eisini søkja.

Starvið verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi 18. mai kl. 15.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Bjarna Heinesen, á tlf. 772420 ella fartlf. 772422.

**Kvívíkar skúli** er ein 3 flokkaður skúli við undirvísing í 1. – 7. árgang. Komandi skúlaár verða 45 næmingar og 6 lærarar. Skúlin er út og umbygdur og er sostatt ein nútímans skúli við sera góðum umstøðum, bæði fyri lærarar og næmingar. Lærararnir hava allir egna farteldu frá skúlanum.

**Kvívíkar skúli**
Frammi í Gerði 6 · FO-340 Kvívík · Tlf. 472400 · kvi@skulin.fo

---

# Føroya Astma- & Allergifelag

Føroya Astma- & Allergifelag hevur aðalfund í MBF húsinum, Íslandsvegur 10

Leygardagin t. 09.05.2009 kl.14.00.

Øll, ið hava áhuga eru vælkomin at verða við til lýsta aðalfundin.

Skrá sambært lógum felagsins.

***Nevndin***

Føroya Astma/Allergifelag